## Deyðsfella hjá Landsverki

Seinastu dagarnar hevur ein gravimaskina hjá Landsverki staðið við útkoyringina á Sandvíkarhjalla. Fleiri bilførarar hava gjørt Sosialin varugan við hetta. Maskinan, sum hevur staðið still í fleiri dagar, tekur sýnið norðureftir frá teimum, sum skulu koyra út av Sandvíkarhjalla. Sum Sosialurin skilir, hevur Landsverk sett maskinuna har fyri at forða teimum, sum leggja fjarhitarørini at grava longur. Vit royndu at fáa fatur á Oyvindi Brimnes, stjóra í Landsverki, men hann var ikki at hitta. Vit spurdu løgregluna, sum fór á staðið at kanna málið. Løgreglan gav beinanvegin Landsverki boð um at flyta maskinuna. Sum myndin sýnir er talan um skilaleysa – og sera vandamikla – parkering.



## Oljuleki rekur djór burtur

Eitt óhapp á flogvøllinum í Kulusuk í Grønlandi hevur havt við sær, at 88.000 litrar av dieselolju eru runnir úr einum tanga og oman á sjógv. Tann fyrsta metingin var, at oljan fór ikki at órógva djóralívið í sjónum við flogvøllin, men nú siga veiðimenninir, at oljan hevur rikið kóp og onnur djór burtur frá landi. Hetta er annars góð veiðitíð til kóp, men veiðimenninir í Kulusuk halda, at tann rami oljulukturin ger, at kópurin heldur seg langt úr landi.

# Fólkaflokskvinnur fingið vitjan úr Danmark

TÍÐINDASKRIV

Leygardagin verður fundur fyri fólkafloksáhugaðum á Hotel Tórshavn í Vágsbotni. Tá fara Henriette Kjær og Pia Christmas-Møller úr danska Konservativa Fólkaflokkinum millum annað at siga frá, hvussu tær hava borið seg at við at troðka menninar í flokkinum av rókini.

Fundurin byrjar stundisliga klokkan 16.30 og endar klokkan 18.00.

Konservativi Fólkaflokkurin er hetta vikuskifti í Føroyum í sambandi við, at flokkurin heldur árliga "sommermøde" her. Skráin er: Marita Hentze bjóðar vælkomin. Henriette Kjær og Pia Christmas-Møller hava orðið. Spurningar og orðaskifti. Kaffi og frukt. Fundurin er ætlaður øllum fólkafloksáhugaðum. Møtið fjølment!





*Fólkatingslimirnir Henriette Kjær og Pia Christmas Møller úr konservativa fólkaflokkinum eru á vitjan hjá fólkaflokkskvinnum*

# SSP samstarv skipað

**Eitt samstarv millum skúla, sosialar myndugleikar og politiið, verður nú sett á stovn í Føroyum**

Stig verður nú tikið til at seta á stovn eitt sokallað SSP samstarv. Tað eru landsstýrismenninir í mentamálum og almanna- og heilsumálum, sum saman við fútanum hava sett á stovn hetta samstarv.

SSP er eitt samstarv millum skúla, sosialar myndugleikar og politiið, og sum ein liður í fyrireikandi arbeiðnum hesum viðvíkjandi verður skipað fyri eini ráðstevnu fyri avvarðandi partarnar á økinum. Tað vil siga myndugleikum, stovnum og øðrum, sum varða av børnum og ungum. Tað eru landsstýrismenninir og fútin sum hava gjørt av at skipa fyri hesum tiltaki.

Endamálið við ráðstevnuni er at kunna fólki um ætlaða SSP samstarvið, og at fáa íblástur til framhaldandi arbeiði innan hetta øki.

Fyriskiparar og íverksetarar miða harafturat eftir at fáa sett ítøkiligar fyriskipanir í verk, soleiðis at eitt skipa samstarv á hesum øki kann byrja í heyst.

SSP-ráðstevnan verður hildin í veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum í dag seinnapartin.



*Ein ráðstevna um samstarvið millum skúla, sosialar myndugleikar og politiið verður í veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum seinnapartin*

*Tilvildarlig mynd*

## Liggjandi góðveður



- Veðrið fer at halda sær um vikuskiftið og út í næstu viku, sigur veðurmaðurin, Petur Skeel. Seinastu tvær vikurnar hava vit havt rættiligt summarveður her á landi. Samstundis regnar í Danmark, skíðveður er í Noregi og nógv avfall er á øðrum støðum kring heimin. Einki bendir kortini á, at góða føroyska summarveðrið er liðugt við tað fyrsta. Um vikuskiftið boðar veðurmaðurin frá turrveðri og sól, við møguleika fyri onkrum mjørkaflókum. Í næstu viku verður landnyrðingurin liggjandi, og heldur veðrið fram á sama hátt. - Væntast kann mjørki og regn av og á, sigur Petur.